## VALGREINAR

# Suðuroyingar, krevjið tykkara rætt!

**Finnleif Guttesen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Vit blíva sparkað 40 ár aftur í tíðuna, nú avloysaraskip fyri SMYRIL skal setast inn í siglingina um suðuroyarfjørð.

Hetta er ikki fyrstu ferð, og við verandi gongd heldur ikki seinastu ferð, at Suðuroyggin verður rakt á hendan hátt.

Vinnulívið hevur vánaligt samband, og við hesum skipið blívur tað uppaftur verri, somuleiðis blívur tað sindrið av ferðavinnu, sum er í Suðuroy eisini so meint rakt, at alt innan ferðavinnu steðgar upp.

Hetta varð prógvað, tá í Claymore silgdi í 2000.

Lat okkum krevja av Vinnumálastýrinum, at teir syrgja fyri, at Strandfaraskip Landsins setur eitt størri og betri skip inn á rutuna meðan SMYRIL er í dokk.

At einki annað skip er til leigu kunnu vit ikki brúka til nakað sum helst.

# Suðuroyggin og framtíðin

**Jákup Olsen**
*valevni Fólkafloksins í Suðuroy*



Ongantíð í søguni eru so stór mál viðtikin fyri Suðuroynna sum í hesum valskeiði. Íløgan verður mett til uml. 2/3 milliard kr..

Smyrlamálið er nú staðfest, og byggingin farin ígongd. Havnirnar verða útbygdar, hetta er galdandi bæði fyri havnina í Vági og á Drelnesi. Vegakervið er eisini viðtikið at gera, somuleiðis tunnellin millum Hov og Øravík. Her er tó eitt at viðmerkja, og er tað, at tunnellin eigur at verða flutt nærri oman ímóti Hovsdali, tí framtíðarbyggingin í Suðuroynni átti at veri inni í Hovsdali, hava vit langtíðarplanleggin fyri eyga, og langtíðarplanleggingin eigur ikki bara at vera í 4 ár, nei í 25 ár ella meira. TANN RÆTTA RAÐFYLGJAN er tí at byggja Smyril fyrst.

Um vegir og berghol vóru gjørd fyrst, so kom eingin Smyril. Nú er sáttmálin undirskrivaður, og tá ið Smyril er liðugt bygdur, eru havnir, vegir og berghol eisini gjørd, soleiðis at hetta stóra skip kann leggja at, og vegakervið kann nýtast til ta tungu ferðsluna, sum er, og sum kemur at vera enn størri. Soleiðis er sett út í kortið, og soleiðis verður. Tí biður Fólkaflokkurin um tygara stuðul til valið. Vísið Fólkaflokkinum sama góða vilja, sum hann hevur sýnt suðuroyingum. Ongantíð í søguni er slík vælvild sýnd Suðuroynni sum undir hesum landsstýrinum. Tað hevur eydnast monnum at trútta niður í fólk : SAMBAND - LOYSING - SAMBAND - LOYSING. Í einum samfelagi er tað ikki bara hvítt og svart, tað er ein rúgva av øllum øðrum málum, og Fólkaflokkurin hevur verið við til at fingið eina ørgrynnu av málum av skafti, tí kunnu vit siga:

VIT SVÍKJA IKKI TYGARA VILJA.

Vís Fólkaflokkinum ÁLIT, so hevur hann ÁRÆÐI og ÁGRÝTNI til at fremja tygara sak.

# Betri arbeiðsmøguleikar á smáplássum

**Gullborg Christiansen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Norðoyggjum*



Í hesum framkomnu KT- og teldutíðum, har vit kunnu samskifta tíðarleyst og óbundið um allan knøttin, skapast møguleikar fyri nýggjum og spennandi arbeiðsplássum á smáplássum og útjaðaraøkjum.

Alt fleiri tænastur og uppgávur, bæði hjá tí almenna og privata, verða veittar gjøgnum alnótina og telefonina.

Hesar tænastur kunnu eins væl liggja úti á smáplássum, ístaðin fyri miðsavnað á størri plássunum.

Við skilagóðum loysnum og tilrættarlegging kunnu fleiri arbeiðspláss leggjast út á smáplássini, við hesum nýggju og framkomnu møguleikum.

Í fleiri førum kunnu hesar tænastur gerast betri og bíligari frá útjaðarøkinum.

Alt frá betri tíð, bíligari hølisviðurskiftum til barnaansing, kann skipast øðrvísi og meira lagað til tørv og eftirspurning.

Hetta er nakað vit í Sjálvstýriflokkinum vilja arbeiða fyri komandi valskeið.

Gev okkum møguleika at fremja hetta í verki, við at seta kross tín valdagin við Sjálvstýrisflokkin ella eitt av valevnum hansara.

Gott val.

# Menningin av Suðuroynni má halda áfram

**Jacob Vestergaard**
*valevni Fólkafloksins í Suðuroy*



Orðini og lyftini eru mong, nú tað stundar til val. Suðringar hava áður hoyrt øll hesi lyftir og lovorð, men lítið er komið av skafti frá teimum, sum suðringar val eftir val hava valt at umboða seg á Løgtingi.

Tað hevur verið líka mikið um umboðini hava sitið í samgongu ella anstøðu, ja, hóast tey hava sitið við landsins leiðslu, er lítið komið burturúr, Suðuroynni at frama.

Suðuroyggin hevur verið afturúrsigld á nærum øllum økjum. Stórur partur av vegakervinum er ikki dagførdur, síðan hann av fyrstu tíð bleiv gjørdur.

Suðringar eru vitandi um støðuna og ymiskir tankar hava verið frammi um, hvat gerast kann. Ja, onkur er enntá farin so langt, at tosað um at stovnað ein serligan "Suðuroyarflokk".

Somu flokkarnir og somu umboðini bjóða seg fram aftur hesafer, og lyftini eru tey somu sum áður; men vit vita hvat úrslitið verður, um hesir flokkar verða umboðaðir aftir. Hugsað verður bert um egnan vinning, Suðuroyggin verður gloymd, so skjótt sum tingsessurin er tryggjaður. Teir hava jú víst hvat teir duga.

Undir sitandi samgongu er Suðuroyggin aftur komin uppí part. Sáttmáli er undirskrivaður um nýggjan Smyril fyri 305 mill. kr., og fyrireikingar eru í gongd við at projekterað nýggja fergulegu á Trongisvágsfjørði, sum verður bjóða út í heyst, og verður liðug at taka í nýðslu á sumri 2004, tá nýggi smyril kemur.

Fyri at arbeiði við at dagføra samferðsluna til Suðuroynna og í Suðuroynni kann halda áfram, er neyðugt at nýggj umboð verða vald at umboða Suðuroynna í Løgtinginum.

Við at velja Fólkaflokkin vilja suðringar tryggja sær, at berghol beinan vegin verður gjørt millum Hov og Øravík, ikki har sum ætlanin er at gera berghol, men har sum suðringar vilja hava bergholið.

Somuleiðis er neyðugt at dagføra alt vegakervið í Suðuroynni, m.a. sambandi millum Trongisvág og Hvalba.

Veljið Fólkaflokkin og tryggið tykkum, at Suðuroyggin aftur verður javnbjóðis restini av Føroyum.

# Eitt sunt vinnulív - eitt sunt samfelag

**Ernst Kass**
*valevni Sjálvstýrisflokksins í Norðurstreymi*



Vinnulív, samfelagsbúskapur og vælferð ganga hond í hond. Gongur tað illa hjá vinnulívinum, so gongur tað illa hjá samfelagnum.

Føroyingar hava í dag eina nærum stuðulsfríða vinnu. Eina vinnu, sum er bygd uppá eitt sunt og mennandi grundarlag, har allur beinleiðis rakstrarstuðul til fiskivinnuna næstan er burtur, og rakstrartølini hjá flest øllum skipabólkum vísa eitt yvirskot.

Eisini gongur væl hjá vinnuni á landi. Her ræður bjartskygnið, og tað fær samfelagshjólini at mala.

**Vøksturin skal halda áfram**

Sjálvstýrisflokkurin ynskir, at hesin vøkstur skal haldað áfram. Tó mugu vit frá almennari síðu haldað eitt vaki eyga við hvussu skjótt samfelagshjólini mala. Vit mugu tryggjað, at tann almenni mynduleikin ber slóg fyri, at karmarnir um vinnulívið eru tryggir og støðugir. Vinnan fær síðani fríðar teymar at virka innanfyri hesar karmar. Karmar, ið mynduleikin, saman við vinnuni er við til at gera.

Karmarnir, sum talan kann vera um eru:

- ein framhaldandi lagaligan vinnuskatt
- færri almenn millumlið
- ongan rakstrarstuðul; tó ein íløgustuðul til íverksetarar
- kravið um, at myndugleikarnir halda seg burtur frá lønarsamráðingum á arbeiðsmarknaðinum
- støðugar karmar

**Tað eru ongir vinnarir í einum verkfalli - bert taparar**

Tað hevur týdning, at vit ikki leggja ov nógvar byrður á hvørki arbeiðstakara ella arbeiðsgevara. Vit skulu finna ein javnvág á tí føroyska arbeiðsmarknaðinum, sum t.d. við lógini um burðarfarloyvi. Ein javnvág, sum skal tryggja, at viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum gerast greið, soleiðis at vit sleppa undan ónøgd og í síðsta enda verkføllum. Verkføll skaða okkum øll; tað eru ongir vinnarir í einum verkfallið, bert taparar.

Tað gamla prátið, um fíggindar báðumegin samráðingarborðið, er farið. Vit eiga at hyggja frameftir. Vit eiga øll at leggja upp til, at tað føroyska vinnulívið er kappingarført - bæði úti og heima. Hetta fer, í síðsta enda, at koma øllum tí føroyska samfelagnum til góðar.

Sjálvstýrisflokkurin verður framhaldandi tryggleikin fyri, at vit hava eitt sunt, virki vinnulív - og harvið eisini eina sunna og virkna verkamannafjøld.

Tískil vil undirritaði heita á tykkum øll - ung sum gomul - veljið Sjálvstýrisflokkin 30/04-2002!

Kósin er greið: Eitt sunt vinnulív - eitt sunt samfelag

Listi D - tín trygd fyri dygd

Vitjið heimasíðu okkara: www.tingakrossur.fo



## VALGREINAR

# Føroyar í Norðurlendskum høpi

**Annita á Fríðriksmørk**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymoy*



Føroyingar hava somu rættindi bæði í Danmark og í øðrum londum, tá ið Føroyar eru sjálvstøðugt land. Føroya frádrátturin í Danmark er onki undantak. Hann er ein skattaavtala millum Føroyar og Danmark, og ávirkast ikki av, um Føroyar gerast sjálvstøðugar.

Norðurlond hava avtalu um, at norðurlendskir borgarar frítt kunnu útbúgva seg í øllum Norðurlondum.

Tey stóru Norðurlondini gjalda sínámillum fyri tey, sum lesa hægri lestur, meðan Ísland ikki letur nakað gjald.

Váttað er úr Danmark og hinum Norðurlondunum, at Føroyar koma við í allar norðurlendskar avtalur, og at Føroyar kunnu fáa somu skipan sum Ísland hevur, vilja vit tað.

Sum sjálvstøðugt land kunnu Føroyar - eins og Ísland og Noreg - gerast partur av einari EBS-skipan mótvegis ES. Hendan fevnr eisini um útbúgvingar og granskingarsamstarvið í ES-londum.

Spurningurin er tí, um tú hevur viljan til at finna loysnir til tess at røkka einum settum máli. Tað hevur Tjóðveldisflokkurin, tí hann veit, at í føroyinginum er vilji, áræði og stoltleiki. Tað førur okkum fram á.

Gott val.

# Høgni Hoydal hevur hvørki bygt land ella fyllt landskassan

**Atli Hansen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Eysturoy*



Í 1998 handaðu vit hesari samgonguni eitt samfelag í góðum standi við eini bjartari framtíð. Eitt gott og ríkt samfelag við stórum yvirskoti á fíggjarlógini at menna landið víðari við.

Men henda samgongan hevði ongar ætlanir um at menna landið. Hon hevði bert eitt fyri eyga og tað var at loysa Føroyar burtur úr ríkisfelagsskapinum - kosta hvat tað kosta mátti.

Vit kenna øll úrslitið. Eitt heilt valskeið er farið uttan tað minsta vet á fullveldisleið, tí fólkið hevur sagt eitt so dunrandi nei, at bæðið Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin soleiðis kløkkaðir eru farnir at tosa um loysnir í ríkisfelasskapinum. Tjóðveldisflokkurin og Høgni Hoydal skulu liva av herrópinum um fullveldi og loysing. Rópið kennist alt meira hvølt og tómt. Og tess meira tóm herrópini gerast tess meira vera demagogisku yvirskriftirnar til Tjóðveldisfundirnar runt landið tambaðar og avskeplaðar.

Hevur Høgni Hoydal bygt nakað land og fyllt nakran landskassa? Nei og aftur nei. Einki er komið afturat bygninginum Føroyar hesi seinastu 4 árini og vøksturin í landskassanum er bara við blokkstuðli. Eingin inntøka framd av Høgna Hoydal. Bert rokningar, sum ein komandi samgonga má gjalda, áðrenn hon sleppur til arbeiðis. Og hvussu kann man gjalda við halli á fíggjarlógini? Tað skal man vist eita Høgni Hoydal fyri at kunna forklára fólki.

Men hetta er framvegis eitt gott og ríkt land at búgva í og hesum fer Sambandsflokkurin framvegis at arbeiða fyri. Hann fer at byggja land við at mennna okkara vinnur til at skapa størri inntøkur sum fortreyt fyri einum sjálvberandi búskapi.

Og hetta skal alt henda í verandi ríkisfelagsskapi. Sambandsflokkurin fer at byggja land. Tað er ein av nógvum góðum grundum til at geva honum krossin á valdegnum.

# Heildarpsykiatri 2002

**Elsa í Garði**
*valevni Fólkafloksins í Surðurstreymoy*



Var á einum sera inspirerandi fundi, har framlagt var: "Álit um skipan av framsøknari psykiatri í Føroyum:"

Sjálv arbeiddi eg fyrst í 90-unum sum sjúkrasystur á psykiatrisku deild 5.

Tað var um reppi at eg fekk hug at søkja um arbeiði aftur, so spennandi var evni lagt fram.

Eftir at hava lisið áliti eri eg sannførd um, at tað er ein gáva til komandi leiðsluna í landinum.

Álitið útgreinar sera nágreiniliga hvat arbeiðast skal fram ímóti/ setast í verk.

Nevniliga

1)Barna - og ungdómspsykiatri
2) Gerontopsykiatri
3) Rættarpsykiatri
4) Misnýtarapsykiatri

Eisini verður komi inn á bygningar sum nú eru 30 ára gamlir og skulu umvælast.

- Soleiðis at sjúklingarnir (sj.) skulu hava einakamar við WC og bað.

Sum er hava teir felags kømur og WC/bað (hvat halda tit ? — og vit skriva 2002)

Ein onnur sera nervandi fylgja av vánaligu hølisviðurskiftunum er.at sj. Við sera ymiskum diagnosum vera stúgvaðir inn á somu deild og búgva enntá á sama kamari.

Tað er alneyðugt at fara til verka sum skjótast at:

- Leggja til rættis økispsykiatri og ambulanta psykiatri.
- Loysa íbúðartrupuleikan hjá teimum sum ikki eru fullfør/ psykiskt sjúk.
- Vegleiða arbeiðisplássini soleiðis at tey ikki eru bangin fyri at útvega arbeiðstilboð til psykisk sjúk.
- Vit vita øll at eitt arbeiðsamboð sum verður brúkt nógv, slítist við tíðini. Soleiðis er tað eisini við starvsfólkunum (amboðunum) á teim psykiatrisku deildunum.

Tí eigur at verða løgd ein miðvís ætlan fyri starvsfólkarøkt og eftirútbúgving.

Við álitinum um heildarpsykiatri hava vit fingið orða ein greiðan málsetning fyri psykiatriska øki.

Sama eigur at verða gjørt fyri restina av heilsuverkinum. Nevniliga at orðaður verður ein greiður málsetningur: Hvat vit vilja og hvat vit ikki vilja við Heilsuverki Føroya.

Gera vit ikki tað, fáa vit ongantíð skil á økinum.

# Sjúkan endar ikki kl. 15, 20 ella 23

**Katrin Jønsson**
*Valevni Javnaðarfloksins í Eysturoynni*



Tey sjúku og veiku, ið kunnu búgva heima, eiga at hava møguleika at fáa sjúkrarøkt alt døgnið, við tilkalliskipan.

Tann ið hevur brúk fyri sjúkrarøkt, hevur tørv á hjálp, um dagin, kvøldið og náttina við, tað vita øll, ið arbeiða við fólkið, ið eru sjúk ella hava brek.

Eingin er liðugur at vera sjúkur kl. 15, 20 ella 23, alt eftir hvussu verandi vaktarskipan hjá heimarøktini er.

Ásannast má, at fleiri og fleiri fólk, sum hava røkt fyri neyðini, liggja aleina og óhjálpin heima, tá heimahjálpin fer eftir seinastu dagligu vitjanina. Tí eigur døgnrøktarskipan, at verða sett í verk beinaveg.

Hetta hevði økt um tryggleikan og møguleikan at verða heima, sum longst.

Í mínum arbeiði sum sjúkrasystur síggi eg dagliga, hvussu stórur tørvur er á hjálp, til sjúk og eldri fólk.

Fólkið fyrst, er slagorðið hjá Javnaðarflokkinum, ið setur liviumstøðurnar hjá fólkinum hægst.

Tak meg uppá orðið set kross við lista C.

# Útreiðslurnar hækkaðar 1 mia. Fruminntøkurnar minkaðar 400milliónir

**Edmund Joensen**
*løgtingsmaður Sambandsfloksins*



- Visti tú, at seinastu fýra árini eru útreiðslurnar á løgtingsfíggjarlógini øktar við umleið 1000 mió. krónum?
- Visti tú at, landstýrið umframt hetta hevur sagt frá sær umleið 400 mió. krónur um árið í frumintøkum, sum tú skal gjaldað aftrat í skatti og avgjøldum í framtíðini?
- Ella visti tú, at hetta er ein skatta- og avgjaldshækking, sum svarar til allan landsskattin hjá øllum føroyingum tilsamans í eitt heilt ár?

Hetta úrslitið eftir fullveldis landstýrið, er ein veruleiki! Hetta er bert byrjanin sambært teimum ætlanum, sum landsstýrið og løgtingið hava samtykt.

Sannast má, at tað er skjótt at bróta niður tað sum tók langt áramál at byggja upp!

Tit veljarar sum vilja steðga hesi skeivu og vandamyklu gongd, hava buktina og báðar endarnar á valdegnum.

Sambandsflokkin veit man hvar man hevur, hann hugsar fyrst og fremst um tína trygd og vælferð. Hann er veruliga alternativið í føroyskum politikki, minnis til tað á valinum.